# Kolya

Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25



Kekkiskur drama/skemtifilmur frá 1996



Høvuðspersónarnir báðir í filminum - fimm ára gamli Kolya og tann 55 ára gamli Louka

Vit eru í Prag undir tí sokallaðu floyalskollveltingini. 55 ára gamli orkesturtónleikarin, Frantisek Louka, hevur mist sítt góða starv í statsliga symfoniorkestrinum. Orsøkin til uppsøgnina er at hann hevur skrivað eitt alment skriv, ið finst at stýrinum. Hann roynir nú at vinna sær pening við at undirvísa privat og eisini spælir hann til jarðarferðir. Louka hevur brúk fyri einum bili, so hann sær møguleikan í at tjena sær nakrar pengar við at gifta seg við eini russiskari ungari kvinnu, ið roynir at fáa uppihaldsloyvi. Hetta fær eitt sindur óhepnar fylgjur, tí unga kvinnan fer beinanvegin úr landinum til sjeikin hjá sær í Vesturtýsklandi. Men fimm ára gamla sonur hennara, Kolya, er eftir hjá Louka. Tann 55 ára gamli er ikki so vanur við at búgva saman við øðrum fólki, og so yvirhøvur ikki at taka sær av einum fimm ára gomlum óvita. Men kortini koma teir báðir at kennast og eitt rættiligt vinalag spyrst burturúr

# City of Angels

TV3 mikukvøldið kl. 20.00

Nicolas Cage er í leiklutinum sum eingilin Seth. Hann starvast í býnum Los Angeles, her hittir hann læknan Maggie Rice (Meg Ryan). Hon er í eini sera truplari støðu, tí hon júst hevur mist ein av sínum sjúklingum. Ein sálarlig kreppa er við at taka seg upp í sinni hennara. Eingilin roynir at stuðla henni alt tað hann kann, men hetta er als ikki ein løtt uppgáva. Og sum tíðin gongur fær eingilin Seth gott eyga á henni. Og kenslurnar taka dik á seg, og eingilin byrjar at ynskja sær, at hann var sjónligur og menniskja. Brádliga fær hann eyga á møguleikan - hann kann býta veingirnar um við eitt lív á jørð, saman við Maggie...

**Romantiskur dramafilmur frá 1998**
Við: Meg Ryan, Nicolas Cage, Andre Braugher, Dennis Franz



Eingilin Seth (Nicholas Cage) fær gott eyga á Maggie Rice (Meg Ryan) í City of Angels



Læknin Maggie Rice hevur brúk fyri einum verndareingli